# 90 milliónir til gransking kann verða spill av pengum

**– Tað almenna skal halda seg langt burtur frá at mynda og stýra vinnuligari gransking, og tí er tað spill av skattaborgarans pengum at brúka 90 milliónir krónur til at byggja eina føroyska granskingarpark, heldur Johnny í Grótinum, formaður í Búskaparráðnum**

GRANSKING
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*



*– Tað almenna skal skipa fyri gransking í almennum viðurskiftum, sum kunnu koma okkum øllum til góðar. Hinvegin skal tað almenna ikki blanda seg upp í og als ikki royna at stýra vinnuligari gransking. Tað skal vinnan sjálv gera, tí politikarar hava ikki skil fyri tí, sigur Johnny í Grótinum, formaður í Búskaparráðnum.*

*Mynd: Scanpix*

Tað almenna hevur ikki skil fyri at skipa og stýra vinnuligari gransking. Tað skal vinnan gera sjálv. Tí er tað spill av skattaborgarans pengum at brúka 90 milliónir krónur til at byggja eina føroyska granskingarpark, um endamálið einans er at styrkja eina útvalda vinnugrein – í hesum førinum ílegugransking.

Tað heldur Johnny í Grótinum, sum er formaður í Búskaparráðnum.

– Tað almenna skal skipa fyri gransking í almennum viðurskiftum, sum kunnu koma okkum øllum til góðar. Hinvegin skal tað almenna ikki blanda seg upp í og als ikki royna at stýra vinnuligari gransking. Tað skal vinnan sjálv gera, tí politikarar hava ikki skil fyri tí, sigur Johnny í Grótinum.

– Tað almenna skal heldur brúka pengar til at skapa góðar útbúgvingar í Føroyum, at lata stuðul til granskaraútbúgvingar og at skapa karmar fyri gransking í lóggávuni. Tær 90 milliónirnar, sum ætlanin er at brúka til eina granskingarpark, høvdu verið nógv betur brúktar til at bygt ein nýggjan miðnámsskúla, heldur hann.

## Ávarar ímóti tilmæli

Ein arbeiðsbólkur hjá Vinnumálaráðnum hevur júst latið úr hondum eitt tilmæli um, hvussu ein føroysk granskingarpark kann skipast, og ein partur av hesum tilmæli er, at tað skulu vera tvey øki, sum føroyingar skulu prioritera fram um øll onnur – hetta eru biotøkni og biokunning.

– Tað er frálíkt, at tað almenna á hendan hátt tekur stig til at lýsa gransking og fortreytirnar fyri meiri gransking í Føroyum, tí gransking hevur stóran týdning fyri øktum búskaparvøkstri, men eg vil ávara ímóti, at tað almenna fer at seta kósina fyri vinnuliga gransking. Hetta er eitt sera fløkt øki, sum tað almenna ongan førleika hevur til at skipa. Myndugleikarnir skulu heldur upplýsa um møguleikarnar í Føroyum, skapa góðar karmar fyri gransking, og so lata vinnuna seta pengar til og gera av, hvat tað skal granskast í, sigur Johnny í Grótinum.

Hann nevnir eitt dømi í Íslandi, har felagið DeCode hevur brúkt fleiri milliardir føroyskar krónur til ílegugransking síðstu 10 árini. Møguliga kunnu teir handilsliggera tað fyrsta patentið komandi ár, so at inntøkur kunnu koma. Tað tekur drúgva tíð og stórar íløgur, áðrenn slík vinnulig gransking kann kasta nakað av sær.

– Tí er tað alneyðugt, at tað eru privatar fyritøkur, sum vilja brúka pengar upp á gransking í Føroyum, og at hesi feløg sjálvi sleppa at gera av, hvat tað skal granskast í. Um slíkar fyritøkur eru villigar at gera íløgur fyri fleiri milliardir í Íslandi, munnu tær eisini vera villigar at brúka tær fyrstu 90 mió.kr her – annars er neyvan nakað at koma eftir. Tað almenna skal halda seg langt burtur frá at mynda og stýra vinnuligari gransking. Hinvegin hevur tað almenna júst skapt nakrar av karmunum fyri ílegugransking við lóggávu um ílegusavn, sigur Johnny í Grótinum.

# Føroysk neyðhjálp tekur tíð at fyrireika

**– Vit gjørdu eitt val. Vit kundu havt kanaliserað pengarnar ígjøgnum ein altjóða felagsskap, men vit valdu at gera nøkur føroysk tiltøk í kreppuraktu økjunum, og slík tiltøk taka tíð at fyrireika, sigur Jóannes Eidesgaard, løgmaður, um óbrúktu neyðhjálpina í sambandi við flóðalduvanlukkuna í Asia**

NEYÐHJÁLP
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*



*Ein av føroysku ætlanunum um neyðhjálp í sambandi við flóðalduvanlukkuna í Asia er at hjálpa útróðrarøkinum í Banda Aceh í Indonesia. Har doyðu eini 130.000 fólk, og gerandisdagurin er nú spakuliga farin at líkjast sær sjálvum aftur.*

*Mynd: Scanpix*

Meginparturin av pengunum, sum fíggjarnevndin hjá løgtinginum í skundi játtaði til neyðhjálp í Asia í sambandi við flóðalduna har, eru ikki brúktir enn, hóast tað eru gingnir sjey mánaðir, síðani pengarnir vóru játtaðir.

Hetta hevur fingið løgtingsmannin hjá Sjálvstýrisflokkinum, Kára P. Højgaard, at seta løgmanni ein skrivligan fyrispurning í tinginum. Løgtingsmaðurin vil hava eina frágreiðing um, hví pengarnir, sum skuldu játtast í skundi, ikki eru brúktir enn.

Løgmaður sigur, at orsøkin til hetta er, at føroysku myndugleikarnir hava valt gera nøkur føroysk projekt heldur enn bara at senda pengarnar avstað.

– Vit veittu beinanvegin eina millión krónur í neyðhjálp, og teir pengarnir vóru sendir til Reyða Kross. Men vit hildu, at tað var í so lítið og valdu so at søkja fíggjarnevndina um tríggjar milliónir afturat, sigur Jóannes Eidesgaard.

– Í tí sambandinum viðgjørdu vit, um vit skuldu senda pengarnar avstað umvegis ein av vanligu felagsskapunum, sum vit brúka í sambandi við neyðhjálparabeiði, ella um vit skulu fáa nøkur føroysk hjálpartiltøk út í økini, so vit samstundis kundu menna okkara førleika at veita hjálp í kreppuraktum økjum. Vit valdu tað seinna, og tað hjálpararbeiðið er ávegis.

## Fleiri ítøkiligar ætlanir

Avgerðin er tikin um, hvat tað mesta av pengunum skulu brúkast til, og tiltøkini at hjálpa ávísum økjum kring Indiska Havið eru á veg.

Ætlanin er at byggja eitt barnaheim á Sri Lanka fyri 1, 7 milliónir krónur, og harafturat skal ein millión brúkast til at hjálpa útróðrarøkinum í Banda Aceh í Indonesia.

Løgmaður heldur, at loysnin hjá landsstýrinum hevur tað við sær, at hóast tað gongur nakað longri tíð, áðrenn pengarnir verða brúktir, so fæst trygd fyri, at pengarnir koma fram á rætta stað.

– Hendan loysnin ger, at vit aftan á kunnu siga, at har fóru teir føroysku hjálparpengarnir brúktir, sigur hann.

*Men tekur tað ikki ov langa tíð at fáa hjálpina fram?*

– Um endin nú var, at vit hóast alt veittu pengarnar ígjøgnum altjóða felagsskapir, so kundi mann sagt, at tað kundu vit gjørt beinanvegin. Men tað tekur tíð at fyrireika ítøkiligar ætlanir, men hinvegin fáa vit tað burtur úr, at vit kunnu vísa á, hvat føroysku pengarnir vórðu brúktir til.

– Tað, sum nógv lond ræðast, er, at pengar verða sendir avstað, men eingin veit, um teir verða brúktir til ætlaða endamálið. Og harafturat siga serfrøðingar, at nú snýr tað seg ikki um talið á milliardum, sum verða sendar avstað, men heldur um at seta í gongd góðar verkætlanir, sum kunnu fáa økið at virka aftur, sigur Jóannes Eidesgaard.